UTTAN ÚR HEIMI

## Genturnar møttu kanska sínum burturflytarum á alnótini

**Løgreglan í Bretlandi ber ótta fyri, at tvær tíggju ára gamlar gentur, sum hvurvu seinasta sunnudag, vóru komnar í samband við onkran á alnótini. Kanningar hava víst, at genturnar vóru á alnótini, beint áðrenn tær hvurvu**

BRETLAND
*Árni Joensen:*

David Beck, rannsóknarleiðari hjá løgregluni, segði í gjár, at teldumenn eru komnir eftir, at Holly Wells og Jessica Chapman vóru á alnótini í ein hálvan tíma sunnukvøldið, t.v.s. beint áðrenn tær hvurvu. David Beck vildi ikki siga, um løgreglan hevði fingið neyvari upplýsingar við at kanna telduna hjá foreldrunum hjá Holly Wells, har genturnar vóru sunnukvøldið, men hann segði tó, at teldukanningin hevði givið týðandi upplýsingar. Hann legði afturat, at løgreglan eisini kannar, um Jessica Chapman hevur nýtt fartelefonina, sum hon hevði uppi á sær sunnudagin, ella um onkur hevur roynt at ringja til hennara.

Stjórin í skúlanum, sum tær báðar genturnar gingu í, hevur greitt frá, at hann fyri fjúrtan døgum síðani ávaraði næmingarnar ímóti at taka upp samband við fólk, sum teir ikki kendu. Skúlastjórin hevði m. a. víst á, at eitt fremmant par hevði roynt at fáa samband við eitt barn í frítíðarskúlanum.

Eitt av teimum stóru blaðútgevarafeløgunum í Bretlandi hevur lovað 11 milliónir krónur í finningarløn, um onkur kann koma við upplýsingum um genturnar, men higartil uttan úrslit. Samstundis hevur løgreglan sent út eina áheitan, har tey, sum burturfluttu genturnar, verða biðin um at boða løgregluni ella einum sakførara frá, hvar tær eru.

Løgreglan leggur dent á, at enn hevur hon eingi prógv fyri, at genturnar verða hildnar aftur ímóti teirra vilja.

250 løgreglumenn úr fimm løgregludømum arbeiða við at loysa gátuna um tær báðar horvnu genturnar.

# Granatálop á sjúkrahús



*Grátandi kvinnur uttan fyri kristna sjúkrahúsið í pakistanska býnum Taxila, har tríggjar sjúkrasystrar doyðu í einum granatálopi í gjár*

Tríggjar sjúkrasystrar doyðu, tá ókendir menn søktu at einum kristnum sjúkrahúsi í Pakistan í gjár.

Læknar á tí kristna sjúkrahúsinum søgdu, at tríggir menn tveittu granatir eftir sjúkrasystrum, sum høvdu verið á einum bønarfundi. Tríggjar sjúkrasystrar doyðu, og 23 fingu skaða.

Hetta er aðru ferð í minni enn eina viku, at ókendir menn hava søkt at kristnum stovnum í Pakistan. Myndugleikarnir halda, at álopsmenninir eru víðgongdir muslimar, sum eru ímóti, at Pervez Mushararf, forseti hevur stuðlað USA í bardaganum ímóti yvirgangi. Tað ógvusligasta álopið var, tá ellivu franskir verkfrøðingar doyðu í einari bumbuatsókn.

Pakistansku myndugleikarnir siga, at tær tríggjar sjúkrasystrarnar, sum doyðu í granatálopinum í gjár, vóru pakistanar.

# Bretland ávarar nú USA ímóti at leypa á Irak

**Bretskir ráðharrar og embætismenn hava harðliga ávarað amerikansku stjórnina ímóti at leypa á Irak. Samstundis sigur ein ráðgevi í Pentagon, at Bush er sinnaður at leypa á Irak einsamallur**

IRAK-STRÍÐIÐ
*Árni Joensen:*

Tað er bretska blaðið The Independent, sum ber tíðindini, ið blaðið sigur seg hava frá diplomatum og týðandi umboðum fyri bretsku verjuna.

Sambært blaðnum hava ráðharrarnir og embætismenninir ávarað um, at eitt amerikanskt álop fer at hava sera álvarssamar avleiðingar fyri viðurskiftini í Miðeystri og í londunum kring Irak. Álopið fer satutt sagt at gera ilt verri.

Í gjár skrivaði eitt annað bretskt blað, The Times, at Tony Blair, forsætisráðharri er undir veksandi trýsti frá sínum egna flokki og frá bretskum fakfeløgum, sum mótmæla, at Bretland skal stuðla amerikansku álopsætlanunum. Tað ljóðar eisini, at dregur amerikanska álopsætlanin út, ætla mótstøðufólkini at fáa næsta ársfundin hjá Labour at sýta stjórnini at hjálpa USA í einum álopi á Irak.

The Independent sigur seg hava fingið at vita, at teir ivingarsomu ráðharrarnir og embætismenninir bera serliga ótta fyri, at eitt amerikanskt álop fer at økja spenningin í Afghanistan, Ísrael og í Kashmir.

### Um neyðugt einsamallur

Men tað er ivasamt, um bretski ivin fær nakra ávirkan á álopsætlanina hjá amerikanska forsetanum.

Richard Pearle, sum er ráðgevi í amerikanska verjumálaráðnum, sigur við bretska blaðið The Daily Telegraph, at hann er ikki í iva um, at George W. Bush, forseti fer at taka málið í egnar hendur, fær hann ikki stuðul frá øðrum.

Men ráðgevin kennir seg kortini sannførdan um, at Tony Blair fer at stuðla Bush, tá saman um kemur. Tað sama hava hernaðarserfrøðingar í Bretlandi sagt, hóast ein meiningakanning vísir, at meirilutin av bretska fólkinum er ímóti, at landið leggur seg út í stríðið millum Bush og Saddam Hussein. Sambært kanningini taka bara 34 prosent undir við, at Bretland skal hjálpa USA, meðan 52 prosent siga nei.

Ein orsøk til bretska ivan er, at eingin veit við vissu, hvør skal loysa Saddam Hussein av, verður hann koyrdur frá. Tað er kanska eisini orsøkin til, at fleiri leiðandi umboð fyri útlagnu iraksku andstøðuna hava verið í USA seinastu dagarnar og tingast við amerikansku stjórnina.



VIÐMERKINGAR

# 03 ella 5 til Búskaparráðið

**Magni Laksáfoss**



Í triðja parti av frágreiðingini frá Búskaparráðnum verður løgd fram »ein nýggj tilgongd til lýsingar av føroyska búskapinum«±. Búskaparráðið vísir á, at øll onnur enn limirnir í búskaparráðnum hava misfatað føroyska búskapin og búskaparfrøðina. Sjálvt um kjakið er rættiliga teoretiskt og tekniskt, vil eg tó royna at geva eitt ílegg til kjakið. Vónandi er mítt innlegg ikki alt ov torskilt.

Innleiðandi í triðja partinum í frágreiðingini greiðir Búskaparráðið frá, at flest allir føroyingar hava eina skeiva uppfatan av øllum búskaparligum viðurskiftum. Støðið verður tikið í Hvítubók, men víst verður á at misfatanin er sera útbreidd:

»Av tí at búskaparliga grundhugsjónin í Hvítubók ikki er eitt einsamalt mistak, men heldur ein vanlig misfatan av búskaparligum samanhangum, verður evnið tikið til viðgerðar. Eftir okkara tykki er hetta sama slag av misfatan, sum viðgjørd er frammanfyri í samband við vinnupolitikkin, og sum so mangan er grundarlagið undir búskaparpolitiskum avgerðum, sum politisku myndugleikarnir taka. Hetta er eisini sama misfatan, sum skínur ígjøgnum, tá tíðindatænastan og fólk flest viðgera føroyskan búskap.«

Sostatt metir eitt samt Búskaparráð, at flest øll: Vinnumálaráðið, búskaparfrøðingar, politikkarar, embætisfólk, tíðindafólk og fólk annars, hava eina skeiva uppfatan av búskapinum. Eg skal ikki her fara longur enn bert at konstatera, at eg ikki eri samdur í áskoðanini hjá Búskaparráðnum.

**Sannleikin?**

Hvat er so sannleikin sambært Búskaparráðnum?

Ráðið hevur sítt boð uppá sannleikan, nevniliga ein ástøðiligan javnvágsmyndil, og ráðið gevur sínum sannleika hetta skoðsmál:

»Við tí nýggja myndlinum ber haraftrat til at fáa nakrar heilt aðrar og rættari forsagnir um ávirkanina av ávísum broytingum í búskaparliga umhvørvinum, enn tær sum vanliga verða førdar fram í almenna kjakinum.«

Sostatt metir ráðið seg hava funnið sannleikan, meðan flest øll onnur hava misskilt alt.

Nú kundi ein freistast til at trúð, at talan einans er um at búskaparfrøðingar eru ósamdir og at tjakið sostatt snýr seg um eina búskaparfrøðiliga ósemju, men hetta avvísir Búskaparráðið.

Fyri at gera øllum greitt at talan er ikki um tvær ymiskar uppfatanir av búskapinum, men um eina rætta uppfatan og so eina misfatan, verður tískil sligið fast:

»Uppfatanin løgd fram her og uppfatanin í Hvítubók eru ikki tvær ymiskar búskaparfrøðiligar uppfatanir. Her er sostatt ikki spurningur um tveir sokallaðar »skúlar« av búskaparfrøði. Í Hvítubók verður hagfrøði uttan haldgóðan botn í búskaparfrøðini útgivin fyri at vera skilagóð búskaparfrøðislig skilgreining – tilætlað ella ikki."

Búskaparráðið hevur funnið sannleikan – Oraklið talar! Øll onnur hava mistikið seg og mugu boyggja seg í dustinum!

Kanska ikki heilt óvæntað eri eg ikki heilt samdur í hesum.

Eg vil tí royna stutt at grundgeva fyri mínum hugsjónum og vísa á munin millum tilgongdina hjá Búskaparráðnum og tilgongdina sum bleiv nýtt í Hvítuók.

**Vinarlig kapping**

Vanliga er ein vinarlig »kapping« millum økonometriskar myndlar, har m.a. økonometriski myndilin EMFI varð nýttur í Hvítubók, og javnvágsmyndlarnar (General Equilibrium), sum Búskaparráðið sigur seg leggja fram í 3. parti av frágreiðingini.

Javnvágsmyndlar hava eisini fyrr verið nýttir í Føroyum, m.a. bleiv ein eisini nýttur í Hvítubók – tey sokallaðu íslendsku tølini. Harumframt bleiv ein javnvágsmyndil eisini uppstillaður og nýttur í sonevnda Caragata-álitinum.

Vanliga verða økonometriskir myndlar sagdir best at kunna lýsa stutttíðarárin á búskapin, meðan javnvágsmyndlarnir best kunnu lýsa langtíðarárin. Av tí at talan er um tvey ymisk analysuøki, liva myndlarnir ofta lið um lið og verða ofta nýttir av somu búskaparfrøðingum til at gera analysur við. Við at nýta báðar myndlarnar kann ein búskaparfrøðingur bæði geva eitt boð uppá stutttíðarárin og langtíðarárin av einhvørjum spurningi.

T.d. hevur danska búskaparráðið nýtt økonometriska myndilin SMEC og javnvágsmyndilin GESMEC. Eisini hevur Danmarks Statistik økonometriska myndilin ADAM og javnvágsmyndilin DREAM.

Við at nýta bæði myndlasløgini kann analysan víðkast og úrslitið gerst vónandi betur. Hetta er eisini orsøkin til at Hvítabók bleiv býtt upp í stutttíðarárin, har økonometriski myndilin EMFI bleiv nýttur, og langtíðarárin, har m.a. íslendsku tølini blivu nýtt.

**Tveir skúlar**

Tá talan er um myndlabygging er talan er um tveir ymiskar skúlar av búskaparfrøði.

Økonometriski skúlin hevur m.a. sum grundfatan, at vit kunnu læra av fortíðini gjøgnum hagtølini, og roynir tískil at nýta makroteoriina til at seta myndlar upp sum kunnu lýsa veruleikan. Datamanipulatión, har hagtølini verða tillaga til teoriina, er forboðin í økonometriskum myndlum. Hetta út frá grundfatanini, at hagtølini vísa veruleikan, meðan tað er teoriin sum má vera skeiv um hagtøl og teori ikki passa saman. Tískil verður støðugt testað um hagtøl og teori passa saman.

Javnvágsmyndlarnir harafturímóti taka støði í mikroteoriini og royna at tillaga veruleikan so at hann passar til teoriina. Datamanipulatión er tískil ein vanligur partur av javnvágsmyndlum.

Javnvágsmyndlarnir eru sostatt, eftir míni fatan, sera teoretiskir myndlar, har gingið verður meiri út frá hvat búskaparteoriin sigur, heldur enn eftir hvussu veruleikin sær út.

Myndilin hjá Búskaparráðnum er tó ikki ein myndil har tøl verða sett á, men einans ein ástøðiligur (teoretiskur) myndil, har ongin roynd er gjørd fyri at síggja um myndilin samsvarar við hagtølini.

Eftir míni fatan livir Búskaparráðið tískil sera væl upp til kenda skemtiliga orðatakið millum myndlabyggjarar: »Hvat skulu vit við veruleikanum, tá vit nú hava eina góða teori?«

**Økonometriskir myndlar**

Hugsanin aftan fyri at skapa økonometriskar myndlar er, at tað er sera torført at finna hvør teori passar uppá júst tað samfelagið, sum talan er um og tí kunnu vit, við at nýta búskaparfrøði saman við hagtølunum fyri eitt langt tíðarskeið (uml. 30 ár), finna út av hvørjir partar av búskaparfrøðini eru galdandi í Føroyum.

Her kunnu vit sostatt fara eitt fet longur enn einans nýta teoriirnar frá búskaparfrøðini. Vit kunnu nevniliga kanna eftir, hvør teori passar best uppá júst okkara samfelag. Hetta er ein stór styrki, eftir míni áskoðan.

Við at byggja ein økonometriskan myndil, fæst at vita, hvørjar teoriir als ikki passa í Føroyum og eisini um eitthvørt týdningarmikið øðrvísi er við føroyska búskapinum, sum ein eigur at taka hædd fyri tá búskaparanalysur verða gjørdar.

**Øðrvísi arbeiðsmarknaður**

Eitt sera áhugavert fyribrigdi í føroyska búskapinum, sum bleiv analyserað undir myndlabyggjanini av økonometriska myndlinum EMFI, var arbeiðsmarknaðurin.

Vanliga verður sagt, at um nógvur aktivitetur er í einum landi – og onki arbeiðsloysi, tí øll arbeiðsmegin verður brúkt – verður lønin trýst upp og kappingarførið gerst so vánaligt, at kappingarvinnurnar byrja at missa marknaðir. Hervið missir landið framleiðslu av ringa kappingarførinum.

Á føroyska arbeiðsmarknaðinum er henda mekanisman sjálvsagt eisini galdandi, men tó spæla aðrar mekanismur eisini inn – serliga fólkaflytingin. Um nógvur aktivitetur er í Føroyum flyta fólk til landið og harvið gerst arbeiðsútboðið størri. Hetta hevur við sær minni trýst á lønirnar og tískil gerst kappingarførið ikki so vánaligt sum annars.

Í búskaparfrøðini verður hetta rópt fyri at Crowding Out mekanismurnar ikki eru eins sterkar í Føroyum og í øðrum londum.

At føroyski arbeiðsmarknaðurin er øðrvísi enn aðrir er sera áhugavert og tískil er hetta fyribrigdið viðgjørt í eini vísindaligari grein, sum undirritaði og Martin Windelin hava útgivið í Nationaløkonomisk Tidsskrift nr. 139.

Tá tað verður nevnt her, er tað bæði tí at tað vísir, at myndlabyggjanin gevur nýggja vitan og tí at hetta sera týdningarmikla crowding out fyribrigdið hevur avgerandi leiklut í javnvágsmyndlum, men er tíverri heilt gloymt í myndlinum sum Búskaparráðið leggur fram í 3. parti í frágreiðingini. Tískil eru fleiri av niðurstøðunum beinleiðis skeivar í frágreiðingini, sum eg vil koma inn á.

**Myndilin hjá Búskaparráðnum**

Við myndlinum frá íslendsku tølunum og Caragata-álitum í huganum, kann tann einfalda skitsan, sum verður teknað í síðu 76 í frágreiðingini hjá Búskaparráðnum, eftir míni fatan, neyvan kallast fyri ein myndil, men átti kanska heldur at verið kallað ein skitsa.

Tá javnvágsmyndlar, sum áður nevnt, ikki er nakað ókent fyribrigdi í føroyskari búskapargransking, má man undrast á, at Búskaparráðið ikki er komið longur við sínum myndli enn til at tekna eina einfalda skitsu av tí sum møguliga einaferð fer at vera ein myndil. Ein skuldi jú trúð, at teir kundu tikið yvir har Caragata-bólkurin ella Hvítabók slapp og ikki byrja heilt av nýggjum við eini einfaldari skitsu.

Einhvør góð grundgeving má vera fyri at síggja burtur frá hinum báðum javnvágmyndlunum? Kanska hava íslendarar og Caragata eisini misfata alt? Bólkurin av fólki sum hava misfata alt er møguliga enn størri?

**Skeivar fortreytir**

Undir viðgerðini av myndlinum í frágreiðingini hjá Búskaparráðnum komi eg fram til, at myndilin / skitsan hevur minst tveir sera avgerandi feilir:

1. Gloymt verður at taka hædd fyri budgetretriktiónini

2. Gloymt verður at arbeiðsmarknaðurin í Føroyum hevur eina veika Crowding Out mekanismu.

Hetta ljóðar sera teoretiskt, men eg skal royna at greiða nærri frá.

*framhald á síðu 32*